LYSINGARTORGIÐ

Lýsingartreytir fyri ókeypis lýsingar:
Privatar lýsingar í mesta lagi 40 orð, bert ein lutur í hvørjari lýsing, hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Frá fyritøkum og virkjum.
Lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
Bill. merktar.

Minsta gjald fyri lýsingar:
70 kr. við MVG hvørja ferð.

Akfør

HYUNDAI MATRIX 1,6
til sølu. Sera vælhildin. Blágráur, metallic. Bensindrivin, 100 hk. Frá juni 2002, dinitrolviðgjørdur august 2002. Koyrt 50.000 km.
Ring og hoyr nærri tlf 583033

TOYOTA AVENSIS 2.0 TD TIL SØLU
Toyota Avensis 2,0 TD frá 99 til sølu. Bilurin er í góðum standi og hevur nýggj vetrardekk. Seinast sýnaður í juli 2006.
Ring 221481 og ger kvettið

DAEWOO NUBIRA
til sølu fyri hægstbjóðandi! aut. gear árg 10.4.01. Er í super góðum standi. Nýsproytaður og ný ístandgjørdur bæði innan og uttan av Karl Sofus Heimustovu. Bilurin hevur bert koyrt 62.200 km. Motorurin skiftur út 24.03.03, hevði tá koyrt 26.800 km. Tvs siga at motorurin hevur bert koyrt 35.400 km!!! Ring og ger eina avtalu ella gev eitt boð.
Tlf. 217597, Søren

OPEL ASTRA TD TIL SØLU
Í góðum standi, 5 hurðar, reyður, nýggja diesel pumpu, koyrt 150000 km. Bíliga til sølu, árg. 2000.
Tlf. 213202

PEUGEOT 505 GTI
árg. 1986 til sølu fyri 3000 kr. Bilurin koyrir fínt, hevur elektriskar rútar framman.
Tlf. 456061

BILUR TIL SØLU
Toyota Carina arg. 95 er til sølu og er í sera góðum standi. Er nýsýnaður og hevur spildurnýggj summar og píkadekk.
Vinarliga ringið á 580695

TOYOTA COROLLA
grønur, til sølu fyri sámuligan prís. 3 hurðar, árg. 01, koyrt 67.000 km. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 569910 ella 592010

NISSAN SUNNY 1.6 DIESEL
árg. 91, til sølu um hóskandi boð fæst. Vinarliga ringið
Tlf. 444167/744167 e. kl. 18

PEUGEOT 306 2.0 GTI
til sølu, árg. 98, 135.000 km, 178 HK, 17" sportfelgur fylgja við.
251938

OPEL OMEGA 2.5 TD
frá 94, í sera góðum standi. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 373660/573660/213202

Alt til akfør

KOBLING TIL SØLU
Ein nýggj komplett kobling til ein VW Polo Classic SDI, árg. 99, diesel, við góðum avsláttri.
Tlf. 448269/252538

PÍKADEKK
Sera lítið brúkt píkadekk á Alu-felgum til sølu fyri 4.000,-kr. Passa til m.a. Suzuki Liana. Ring ella skriva til:
585606 ella angar@ez.fo

TIL SØLU
Ein sikringsboks til Ford Escord 97 /90 til sølu
250508

TIL SØLU
Ein Suzuki GT skutari til sølu, krevur ábøtur
250508

SERA LÍTIÐ BRÚKT
píkadekk 175/65-14 til sølu.
Tlf. 314161

Arbeiði

SØKIR EFTIR ARBEIÐI
Eg eri ein 21 ára gomul genta, sum søkir eftir arbeiði í Havn. Àhugan er innan fyri handilsvirksemi.
Tlf. 215503

FLISER
Pensionist søger indendørs flisearbejde i Tórshavn og omegn.
Tlf. 228058 el.314434

UNG PIGE I HUSET
Ungt erhvervsdrivende færøsk/dansk ægtepar søger en ung pige i huset til at passe vores søde lille datter, Maria, på 14 mdr. Maria er en smilende, glad og tilfreds pige, som du helt sikkert vil komme til at holde utrolig meget af. Udover pasning af Maria vil du også komme til at varetage opgaver i den almindelige husholdning. Du vil naturligvis blive taget varmt imod og indgå som en del af familien. Løn: Fri kost og logi, samt 5500 kr. i mdr. Arbejdssted: Jylland, Silkeborg midtby. Hvis dette har vækket din interesse, så kontakt os venligst, Arnhild og René, på tlf.: 00 45 21 66 77 92, bedst aften, eller mail til: skostedet@ mail.dk Vi ser frem til at høre fra dig.
tlf.: 00 45 21667792

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkabláur Simo kombivognur, hevur lufthjól, stýrið kann innstillast í hædd, babylift 85 cm. Regnslag og flugunet fylgja við.
Tlf. 318336

SERA GÓÐUR BRITAX
bilbarnastólur til sølu. Stólurin kann regulerast alt eftir um barnið skal sita ella liggja - vekt 0-13 kg.
Tlf. 210174/310174

REISUSONG
Hvít reisusong til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 599789

SVARTUR, LÆTTUR CARENA
klappstólur, til sølu. Reg. hondtak, rygglen at legga niður, beininnstilling, frontboyla, kurv, 5 pkt. sela, vanl. punkterfrí hjól og forleður. Sum nýggjur, og ætlaður børnum upp til 15 kg. Prísuppskot kr. 900.
Tlf. 216396

TVÍBURÐAKLAPPVOGNUR TIL SØLU
Bláur tvíburðaklappkoyristólur við kalesju og kurv.
Ring 320266 eftir kl.17.00

TREMMUSONG YNSKIST
til keyps við madrassu fyri ein bíligan penga. Eisini ynskist ein tryggur bilstólur til barn (0-18 kg).
Tlf. 594702/594713

BABYKODDI OG DÝNA
og baðikar við stativi, alt keypt í B & B, alt til sølu fyri kr. 500,-
Tlf. 554508/318275

STÓLUR YNSKIST
Ein barnastólur ynskist til keyps av merkinum Emmaljunga Serox, skal vera í góðum standi.
Tlf. 262946

Barnaansing

HEY HEY!!
Er tað nakar sum kann ansa mær meðan mamma og babba eru til arbeiðis? Eg eiti Hákun og eri 2½ ár.
Vinarliga ring 275282

Bátaútgerð

FISKILOYVI 5B YNSKIST TIL KEYPS
Fiskiloyvi 5b ynskist til keyps til 28 fót bát.
545157

10-MANNAFAR TIL SØLU
við fiskiloyvi 5B. Báturin krevur ábøtur. Um áhugi bert er fyri fiski-loyvinum, kunnu vit tosa um tað.
Tlf. 256177

TIL SØLU
Bátur í góðum standi til sølu. Fýra heilaut. Oilwind snellur til sølu.
Tlf. 221519

Bingo

HEY HEY!
Ja, nú nærkast tað stóra páskar-eggja tombola sum verður í Glæm-uni í Kvívík 18. mars kl. 16. Í ár verða tað 700 páskaregg, so nú er møguleikin uppaftur størri at vinna nøkur páskaregg.
KFUM-Skótarnir í Kvívík

GOTT BINGO
verður í høllini á Skála sunnudagin 21. jan. kl. 16. Vinningar: Flogferð, oksakjøt, gávukort og mangt annað.
Skála Ítróttarfelag

Burturm. /funnið

BURTURMIST FARTELEFON
Eg havi mist mína ljósareyðu Motorola RAZR V3 fartelefon burtur í Eysturbýnum tann 13/1-06. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga ring á
587039

TASKA VIÐ BRILLUM
Taska funnin á Heygum, Vestmanna í des. 2006. Taskan er lítil og svørt av merkinum Aviano. Í taskuni eru einar reyðar smalar brillur við perlum.
Tlf. 424418/724418, Ásla

BELTI TIL FØR. BÚNAN
Um nakar hevur funnið eitt belti til føroyska búnan í miðbýnum á ólavsøku, biðist viðkomandi ringja til
Tlf. 317320

Býli í Føroyum

KAMAR TIL LEIGU
við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu, frystiboks. Nær við Læraraskúlan/Sjómansskúlan.
Tlf. 221158

VERILSI TIL LEIGU
í Hornabø í Havn, egin inngongd, atgongd til wc, køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 317507

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
Eg eri ein tilkomin kvinna, ið ynskir eina íbúð í Tórshavnar umráðnum skjótast gjørligt. Max 4000 kr. Fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 517651

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST!
Eg eri ein mamma við 3 børnum, ið leiti eftir eini íbúð ella einum húsum til leigu í Havn/Argjum ella í Hoyvík sum skjótast! Má hava min. 3 kømur. Vit fara væl um og eg gjaldi rættstundis!
Tlf. 590807

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð í Tórshavn. Bæði hava fast starv. Roykja ikki.
Tlf. 250575/252040

HJÁLP
vit eru eitt ungt par, í leita eftir eini íbúð í Klaksvík. Vit fara væl um og gjalda til tíðina, prís uppskot max 4500 við hita. Um onkur hevur eina íbúð til okkum kunnu tit ringja á
588049

HJÁLP!!!!
Vit eru eitt ungt par, í leita eftir íbúð skjótast gjørligt í miðstaðarøkinum. max 5000 kr um mánaðin við ljós og hita. Vit fara væl um og gjalda til tíðina.Vinarliga ring á
257604/220649

HÚS TIL LEIGU
í Havn. Nær við Studentarskúlan, Gundadal og svimjihøllina. Húsini hava 5 kømur, 2 baðiverilsir, stovu, køk og gongd. Kann leigast út hvørt kamar fyri seg, ella alt saman. Leigumálið kann taka við hálvan februar.
Tlf. 231011

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðaligur maður søkir íbúð í Havn.
Tlf. 253428

Býli uttanlands

TIL SØLU Í VANLØSE
3-ver. andeilsíbúð í Vanløse til sølu til yvirtøku 1. mars. Húsaleiga undir kr. 2600,- pr mør.
Tlf. 213334

KAMAR I ROSKILDE-KEYPMANNAHAVN
Hevur tu eitt kamar-litil ibuð, biliga til leigu fra 31.01-08.02 til tvey vaksin i Roskilde ella Keypmannahavn so skriva til min. Helst ikki kosta yvir 1000 kr i alt.
labbarfyra@hotmail.com

HEY HEY!
er tað nakar, sum veit um eina íbúð á kbh leiðini, so sig frá.
Tlf. 298 505585

ÍBÚÐ YNSKIST Í KEYPMANNAHAVN
Er tað nakar ið hevur eina íbúð í Keypmannahavn at framleiða mær, tíðarskeið 1. mars- 1.mai, so set teg í samband við meg.
447657 / 748053
sunnevam@post.olivant.fo

Dansur

DANSISTOVUGAMAN
dansar sunnukvøldið 21. jan. frá kl. 20 til 22 í skúlagarðinum í Trongisvágs skúla. Nýggir dansarar eru vælkomnir.
Nevndin

Dýr

SERA FITTUR KETTLINGUR
Ein sera fittur kettlingur - 10 vikur gamal - verður latin. Hann er reinligur og er sera róligur, mamma hansara er persisk.
Tlf. 310660/210660

DVØRGA HAMSTRARA-UNGAR YNSKJAST
til keyps. 2. stk dvørghamstara ungar ella vaksnir dvørghamstarar ynskjast til keyps.
Tlf. 228956

FUGLABÚR
Fuglabúr til undulát til sølu fyri 150 kr. Sera nógv tilhoyr fylgir við!
Tlf. 599789

HVØLPAMOTIVATIÓN
Vit skipa fyri hvølpamotivatón ymsastaðni í landinum. Ring og hoyr nærri:
Klaksvík Ester tlf 22 02 33
Toftir Sóleyg tlf 26 41 31
Tórshavn Fríðhild tlf 22 84 94
Heilsan HUFF

LIMAFUNDUR
Limafundur verður í Margarin-fabrikkini leygardagin 20. januar kl 15. Limir eins væl og komandi limir eru vælkomin.
Djóraverndarfelagið, 504533

HUNDAHVØLPAR
Tveir sera fittir hundahvølpar (hannar) verða lætnir djóravini. Teir komu í verðina 21. novembur og kunnu fáast beinanvegin. Áhugað kunnu ringja
Tlf. 424666

KETTLINGUR
sera fittur kettingur verður latin djóravini. Er reinligur og dugur at eta og drekka.
Tlf. 448787

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Alt til akfør	❑ Amboð
❑ Arbeiði	❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð
❑ Bátaútgerð	❑ Bingo	❑ Brævaskifti
❑ Burturm./funnið	❑ Býli	❑ Býli uttanlands
❑ Bøkur	❑ Dansur	❑ Dýr
❑ Fartelefonir	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súkklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl 12.00 dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsingin til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi.
Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki